Dimmalætting

Stovnað 1878
Ábyrgdarblaðstjóri: Beate L. Samuelsen
Blaðstjóri: Ingi Samuelsen
Útgevari: P/F Dimmalætting
Prent: Dimmalætting

Avgreiðsla:
Mánadag til hósdag kl. 8.00-17.00
Fríggjad. kl. 8.00-16.00 Leygard. stongt
Telefon: 11212. Telefax: 10941.
Postadr.: Smyrilsvegur 13, Postboks 19, 110 Tórshavn. e-mail: sí baksíðu.
Heimasíða: www.dimma.fo

INNLATINGARFREIST FYRI LÝSINGAR

	Týsdags-blaðið	Mikudags-blaðið	Hósdags-blaðið	Fríggjadags-blaðið	Leygardags-blaðið
1/4 síða ella størri	Frí. kl. 12	Mán. kl. 12	Týs. kl. 12	Mik. kl. 12	Hós. kl. 12
Minni enn 1/4 síða	Frí. kl. 14	Mán. kl. 16	Týs. kl. 16	Mik. kl. 16	Hós. kl. 16
Smalýsingar					
Okkara Gulu	Má. kl. 10	Týs. kl. 10	Mik. kl. 10	Hós. kl. 10	Frí. kl. 10

Lítlýsingar og lýsingar við framíhjáplássi mega latast inn dagin fyri omanfyri nevndu freist.

Vanligar treytir: Síðustødd: 8 teigar á 41x515 mm. 1/1 síða 4 160 mm. Útsjónd Lýsingar, sum eftir blaðsins meti kunnu mistakast fyri blaðtilfar, skulu merkjast við orðinum: Lýsing, sum verður roknað uppí lýsingarmátið. Orðið INSERAT verður ikki góðtikið. Innlatingarfreist fyri lýsingar: Sæst á skemanum til vinstru.

Fyrivarni: Innihaldið í lýsingunum má ikki stríða móti galdandi lógum. Ábyrgdina fyri hesum hevur lýsarin. Blaðið tekur sær rætt til at sýta at taka lýsingar við, sum blaðið metir óynskiar.

Teknisk viðurskifti og umhugsan fyri lesarum og lýsarum ger, at blaðið má tilskila sær rætt til at
1. gera smærri týdningarleysar broytingar í lýsingum hvat teksti og uppsetan viðvíkir.
2. skjóta út eina lýsing til seinni blað. Lítlýsingar kunnu bert takast við, um tekniski viðurskiftini loyva tað.

Endurgjald fyri møguligar villur, sum lýsarin sjálvur ikki hevur skyldina fyri, er vanliga prísavsláttur eftir blaðsins meti um virðisminkan av lýsingini, men í mesta lagi at lýsingin, ella líknandi lýsing, verður tikin við aftur seinni ókeypis. Villur, sum standast av vánaligum lýsingartilfari hevur blaðið onga ábyrgd av.
Lýsingar, sum verða inntelefoneraðar, verða altíð lisnar uppaftur, og blaðið tekur tí onga ábyrgd fyri villur, sum koma á henda hátt.

Oljupengarnir brúkast til loysingina

Seinastu dagarnar hava vit havt vitjan av bretskum hjálparskipi við føstum tilknýti til oljuvinnuna.

Øll bíða vit eftir havsins gulli, men enn hevur eingin, ið hvssu er ikki almenningurin, fingið at vita, hvussu statt er við oljuni á føroyskum sjóøki.

Helst man onkur, ið hevur meiri og nærri kunnleika til hesa vinnu, vita munandi meiri enn vit onnur, sum bara sita og bíða og bíða í tí vón, at skjótt fer dagurin at koma, tá vit við einum ælaboga sum peilara finna fram til gullið. Søgin sigur jú, at gull finst á staðnum, har ælabogi tekur seg upp.

Nógv verður gjørt burturúr fyri, at vit kunnu standa til reiðar at taka ímóti eini møguligari oljuvinnu.

Men hvar er hon?

Hóast møguleikin er fyri at finna ríkar oljukeldur um okkara leiðir, hava vit ikki hoyrt nærri um hetta enn. Tá oljuøki verða funnin, liggja teyr altíð uttanfyri føroyskt mark.

Tað er kanska løgi, at so er. Men hetta er veruleikin.

Mangan hava vit skrivað og viðgjørt oljuævintýrið, sum letur bíða eftir sær, uttan at minsta petti hendir.

Teir føoyingar, sum hava fingið sær kunnleika innan oljuvinnuna, hava havt trupult við at finna arbeiði, hóast háfloygd orð um, at hetta var tað einasta rætta í hesum døgum.

Tað, at eitt innregistrerað hjálparskip úr Hetlandi, ið rikið verður av fyritøku í Abderdeen vitjar, festir aftur eina vón í onkran av okkum, sum rættiliga ikki trúgva uppá alt hetta, sum samfelagið so tolið liggur og bíðar eftir skal bjarga føroyska samfelagnum undan neyð og elendigheit, um vit kunnu kalla tað so.

Vit krøkja við hond og fót okkum føst í hesa vón. Serliga var bjartskygni um oljuna stórt í ringastu krepputíðum.

Hvat skuldu vit annað gera!

Eins og aldudalur birtist vónin um oljuna millum fólk við ávísum millumbili fyri síðani at steðga eitt sindur upp vegna onnur átrokandi mál so sum klandur innan summar politiskar flokkar, føroyskan stuðul ella ikki-stuðul til stjórnina á fólkatingi, løgtingsval og annað. So skjótt, hesi mál kámast burturaftur, stingur oljan seg upp.

Einastu oljudropar, vit higartil hava sæð her á landi, eru teir, sum liggja í risa stóru tangunum hjá stóru oljufeløgunum, og sum kosta tað "hvíta út av eygunum", í somu løtuni, tú skalt fylla tær oljutangan við hús.

Og hevur bilur verið fyri tí óhappi at leka nakað av olju í túninum, fert tú at ivast í, um hetta er oljan, sum úr jørðini sprikir upp á tínari ogn, og tú harvið gerst miljóningur, ella um hetta um hetta aftur er bilur, sum er í ólagi, og sum ráðini ikki eru at gera í stand aftur - tí oljukeldur enn ikki eru funnar á føroyskari ogn, landi sum sjógvi.

Og meðan alt hetta hendir, bíða vit aftur í tolni eftir oljuni, meðan vit í huganum meta okkum saman við ríku oljusheikarnar í sand-oyðimørkini og eru um at missa svøvnin, ikki av at vit ikki hava funnu nakra olju enn, men hvat vit skulu brúka allar milliónirnar til, sum oljuvinnan fer at geva av sær.

Viðhvørt hava vit varhugan av, at peningarnir, sum ikki eru har, longu eru brúktir, ið hvussu er, tá vit hoyra um allar tær ætlanir, ið tjóðveldisfólk hava við at krevja loysing í morgin!

Tillukku við barninum

Hvønn leygardag ynskir Dimmalætting foreldrum tillukku við lítla barninum, annaðhvørt bara í teksti ella í teksti og myndum. Hetta gera foreldrini sjálvi av. Send bræv/bjálvan til Dimmalætting, postboks 19, 110 Tórshavn merkt »Tillukku við barninum«, skriva avsendara, navn og adressu, so vit kunnu senda myndina aftur sum skjótast. Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd í blaðið. Vit skulu hava myndirnar í seinasta lagi fríggjamorgun. Um foreldrini ynskja tað, kann myndafólk frá blaðnum taka myndina ókeypis. Ring 11212, og vit avtala nærri

Orðið

Les Jákup 3,13-18

DRÚVURNAR SÚRU

Kærleikin ber ikki øvund 1 Korintbræv 13,4

ÓGVULIGA stórur diamantur lá í framsýningarglugga hjá Cartier'sa Fifth Avenue deild í New York. Fullkomni 69,42 karat gimsteinurin var keyptur fyri eina millión dollar. Prúð mannamugva kom at forvitnast, og mong margháttlig viðmerking slapp um varrar. Ein maður helt fyri: »Hann segðist vera brekleysur, eg síggi kortini rivu.« Kvinna mælti fyri munni: »So ól'sáliga penur haldi eg ikki, hann er.« – »Ov stórur,« datt úr einum og »klossutur« úr onkrum øðrum.

Vaktarmaður við handilin, ið hoyrdi mangan slíkan lættisoppin, mátti ásanna: »Eg havi »svølgt« fleiri súrar drúvur teir báðar farnu dagarnar enn alt lívið annars!«

Er tað ikki merkiligt, hvussu øvundsjúka fær tunguna á fólki á glið, so sjálvklók at fella dóm í málum, sum onnur hava brúkt lív sítt alt til at duga, ja, hvussu djarvt øvundandi fólk »verpa niðrandi neyðaregg«.

Øvundsjúka er vandamál, flestu okkara berjast við onkuntíð. Hitta vit onkran hepnari enn okkum sjálv, onkran, sum hevur »skotið« pappageykin, vunnið fólkatekki og sjónsk avrik – so gitist feril av undirlutakenslu og fjóning, vit gerast atfinningarsom, royna at skorða sjálvgóðskuna við kveistran at hinum. Slíkt eru súru drúvur øvundarsótta.

Gongur tú drúvusúrur? Blaka burtur beisku øvundina til frama fyri fjálgandi kærleik (1 Korintbræv 13,4). Tað fer at roynast dugurin dyggi.

©-prp-

Tøkkir

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið góði maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

Birgir Kristvin Ryan
Klaksvík

so brádliga varð tikin frá okkum.
Hjartans tøkk til Sverra Steinholm, prest, fyri góð og troystarrík orð. Tøkk til Gudmund fyri stórt hjálpsemi. Takk fyri vitjanir, brøv og aðrar heilsanir. Tøkk til kirkjutænarar og berarar. Tøkk til Emmauskórið fyri vakran sang. Tøkk fyri blómur og kransar. Eisini tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvídarstað.
Hjartans tøkk øll somul.

Kristin, Birgit, Ann, Jógvan og børnini

Hjartaligu takka vit øllum tykkum, sum luttóku í stóru sorg okkara, tá okkara høgt elskaði sonur, beiggi, mammu- og pápabeiggi og svágur

Axel Olsen
Hvalba

so brádliga varð tikin frá okkum. Takk til Andrias Andreasen, prest, fyri góð og troystarrrík orð í heiminum og kirkjuni, takk til manning og reiðari á Palla hjá Mariannu fyri stóra hjálp og umsorgan, takk til Jan, sum í tí ringa veðri vildi fara í Vágarnar, til Gert við familju, sum tóku ímóti á flogvøllinum, takk til Maritu og Charles, til øll, sum komu inn til okkum og til tykkum, sum ringdu. Takk til tykkum, sum bakaðu og hjálptu til við jarðarferðina, til kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravarar. Takk fyri blómur, kransar og brøv, og til tann stóra skara, sum fylgdi Axel til hansara seinasta hvíldarstað.

Fam. vegna
Astrid og Niels Pauli

Ongin veit hvat lívið bjóðar
kanska fekk eg besta lut
tí at eg á ungum aldri
sloppin eri heim til Gud

Brøv

Tøkk til útvarpsvertir

Fríggjadag kl. 15-16, tá útvarpsverturin kemur við teimum supergóðu 60-ara slagarunum, tá gloymir man bæði tíð og stað. Hann er bara fantastiskur.

Verturin í tónleikarsendingini mánadag kl. 15-16 er eisini ótrúligur, tá hann blandar 60- og 70-slagarar saman við góðum country í heimsklassa.

Og ikki at gloyma vertin í Burtur á Heiðini, tá hann so týðiliga forklárar um stjørnurnar, sum hann letur syngja. Man fær alt at vita frá byrjan.

Spell, at tit ikki leggja plátur á til gamlamannadans onkuntíð.

Heilsan
ein trúgvur lurtari

Fundarsamtyktir

Á aðalfundi felagsins 20. og 21. mars 1998 eru gjørdar hesar fundaramtyktir:

Aðalfundurin staðfestir, at hóast fiskiskapurin er øktur seinnu árini, so hevur hetta ikki økt um arbeiðið innan fiskivinnuna á landi, heldur tvørturímóti.

Aðalfundurin átalar harðliga, at almennu myndugleikarnir einki munagott gera fyri at forða fyri, at fiskurin fer ótilvirkaður av landinum við tí avleiðing, at arbeiðsloysið innan fiskivinnuna á landi, sum er primervinna okkara, alsamt økist.

Aðalfundurin átalar eisini, at Føroya Fiskavirking ikki hevur víst vilja til at lata øðrum tey flakavirki, sum standa tóm kring landið, hóast Fiskavirking kundi medvirkað til, at arbeiði aftur kundi verið skapt á teimum plássum, har hesi flakavirki standa tóm.

Føroya Fiskavirking setir við sínum treytum fyri avhending av virkjunum forðingar í vegin fyri teimum framtakshugaðu kreftum kring landið, sum kundu skapt arbeiði til nógvar vinnuførar hendur, og heitt verður tí á leiðsluna fyri Føroya Fiskavirking um skjótast til ber at medvirka til, at onnur kunnu yvirtaka tey virki, sum nú standa tóm, hetta til frama fyri land og fólk okkara.

Aðalfundurin átalar harðliga, at Føroya Landsstýri og Føroya Løgting ikki hava veitt teimum lágløntu á landi sama skattalætta, sum veittur er øðrum løntakarabólkum.

Aðalfundurin vísir í hesum sambandi á, at tey, sum starvast innan fiskivinnuna á landi, bert hava ALS-stuðulin at dúva uppá, og við teimum avmarkingum sum støðugt eru framdar í rættindunum at fáa ALS-stuðul, er hesin løntakarabólkur fíggjarliga sera illa fyri, og tað er átalu vert, at politiski myndugleikin ikki hevur veitt hesum bólki sama skattalætta, sum aðrir løntakarabólkar hava fingið.

Nú teir borgarligu flokkarnir hava havt ætlanir um at sett í gildi lóg um arbeiðsrætt, skal aðalfundurin harðliga mótmæla hesum ætlanum, sum eru ein roynd at gera mun á ymsum samfelagsbólkum, og sum í ólukkumát høvdu skert grundleggjandi demokratisk rættindi hjá fakfelagsrørsluni.

Sum fakfeløgini áður hava víst á, so eiga partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir at finna fram til eina skipan, sum á tryggan hátt kann avgreiða møgulig trætumál millum partarnar, men vit mugu tíverri ásanna, at arbeiðsgevarasíðan ikki hevur víst áhuga fyri at tikið upp samráðingar um slíka skipan.

Aðalfundurin skal harðliga mótmæla teimum skerjingum, sum framdar eru innan heimarøktina, men hetta er tíverri enn eitt dømi um tann politikk, ið førdur hevur verið í áravís, og sum í ólukkumát hevur rakt tey veikastu í samfelag okkara, nevniliga tey sjúku og gomlu.

Tórshavn
tann 21. mars 1998
Føroya Arbeiðarafelag

Dimmalætting
Smyrilsvegur 13,
Postboks 19, 110 Tórshavn

Dimmalætting rindar postgjaldið
106

Ja!

Undirritaði teknar seg sum haldari av Dimmalætting. Kostnaðurin er 265 kr fyri ein ársfjórðing. Fyri haldarar uttanlands er annar prísur galdandi.

☐ Eg tekni meg sum haldara henda ársfjórðingin

Til ber altíð at gerast haldari. Goldið verður bert fyri bløðini, ið eftir eru av ársfjórðinginum

Navn ....
....
Bústaður ....
Postnr. ....
Býur/bygd ....
....
Undirskrift .... Tlf. ....

Veitst tú, at
- Barna- og Ungdómstelefonin svarar hvønn mánadag millum kl. 16-18
- Telefonin er 10645
Foreldur eisini kunnu ringja og fáa ráðgeving.
Tey, sum svara, hava tagnarskyldu.
Tú kanst vera anonymur.

Hvat kanst tú ringja um
Persónligar trupulleikar av øllum slag, t.d. incest, anorexia el. bulimi, alkohol, fyribyrging, royking ella bara hava brúk fyri at tosa við onkran vaksnan.

Minnist til smáfuglarnar